# Neytamykjukapping, bál, grill og dansur

**Ungmannafelagshúsið í Nólsoy skal gerast rúmligari, meira nútímans og betur atkomiligt hjá øllum borgarum landsins. Í hesum sambandi skipar Royndin fyri neytamykjukapping, báli, matsølu og dansi í Nólsoy í kvøld. Ritan og Norðlýsið sigla í samband við tiltøkini**

TILTØK
*Vilmund Jacobsen*




*Tað verður neyvan sum á ovastevnu í Nólsoy i kvøld, har tilsamans 800 fólk vóru í dansi fríggjakvøld og leygarkvøld. Nólsoyingar vænta tó, at tey tiltøk, sum verða í kvøld við neytamykjukapping, báli, grill og harmonikudansi fara at "lokka" nøkur fólk út í oynna, nú ferðasambandið verður so gott.*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*

Í kvøld og í nátt verður stórt innsavningartiltak í Nólsoy til frama fyri ungmannafelagið í bygdini, Royndina.

Í eina tíð hava nólsoyingar og fólk við tilknýti til bygdina selt lutaseðlar kring landið, sum eru við í eini neytamykjukapping.

Malan Hansen sigur, at lutaseðlarnir kosta 100 kr. hvør, og higartil hevur eydnast at selja einar 600 seðlar.

Tá ið vit frættu úr Nólsoy hóskvøldið, vóru einir 80 seðlar eftir av teimum 676, sum felagið læt prenta.

## Neytamykjukapping

Í kvøld verður so eitt rættiliga stórt tiltak í Nólsoy, og í hesum sambandi siglir Norðlýsið úr Havn kl. 21, og síðan siglir strandfaraskipið, Ritan, úr Nólsoy kl. 04.30.

Skráin fyri kvøldið byrjar við neytamykjukappingini, sum verður kl. 19.

Tá fara tveir mans, Ivan og Beinir, at leiða ein tarvkálv eysturi á Mýrum á einum øki, sum er 13 ferðir 13 metrar stórt.

Tá ið hesin hevur gjørt sína skyldu fýra ferðir, er greitt, hvør eigur vinningarnar á lutaseðlunum. Hetta er tó ikki tarvurin, sum vunnin verður. Vinningurin kemur frá MBM-Kjøti í Hósvík. Tað er ein tarvkálvur, pakkaður í fjórðingar, har bitarnir ella stykkini eru klár at seta í ovnin ella koyra í grítuna.

Sostatt verða fýra vinningar at vinna í hesi kapping.

Malan sigur, at tað hevur gingið rímiliga væl at selja lutaseðlarnar til neytamykjukappingina, og hon vónar, at flestu seðlar eru seldir, tá ið kappingin um fjórðingarnar byrjar í kvøld.

## Bál og grill

Í kvøld kl. 20 verður eisini sólstøðubál á Mýruni ella uppi á Hørgini, og har verður eisini grillveitsla. Eitt nú pylsur, kjøt á spjóti og bakaði epli kunnu keypast, eftir at tarvurin hevur gjørt sína skyldu, og vinnararnir eru funnir.

Malan sigur, at kl. 23 byrjar harmonikudansurin, og æltanin er, at hann varar til kl. 04.

- Vit hava roynt at fingið onkran tónleikabólk út higar at spæla, men líkt er til, at hesir eru nógv upptiknir í vikuskiftunum. Men vit hava góðar tónleikakreftir her úti í Nólsoy, so tað er eingin trupulleiki. Hilmar Joensen, Charles Gade og Rene Hansen fara at spæla til dans. Teir duga allir síni ting og eru royndir í leikum, so dansurin verður ikki verri fyri tann skuld, at tað eru nólsoyingar og fólk, sum búgva í Nólsoy, sum her taka um endan, sigur Malan.

Atgongumerkini til dansin í kvøld kosta bert 60 krónur, og høvið verður at keypa smurt breyð og okkurt at skola breyðið niður við.

- Fólk kunnu keypa breyð við eitt nú skerpikjøti og rullupylsu, og tvær hálvar breyðflísar fáast fyri bert 10 krónur.

Malan sigur, at dansurin verður niðri undir í ungmannafelagshúsinum, meðan sølan av breyði og leskandi verður uppi á.

Sum nevnt, siglir Ritan úr Nólsoy aftur kl. 04.30, og tí er einki til hindurs fyri, at onnur enn nólsoyingar eisini nýta høvi at uppliva neytamykjukapping, bál, grill og harmonikudans í Nólsoy í kvøld.

Tosað hevur verið um at fáa Norðlýsið, sum siglir út til Nólsoyar kl. 21, eisini at gera ein túr kl. 23, men í skrivandi stund er ikki greitt, hvussu verður við hesum.

## Royndin útbyggjast

Malan sigur, at endamálið við tiltøkunum í Nólsoy í kvøld og lutaseðlasøluni, sum verið hevur, er, at savna inn pening til útbygging og umbygging av ungamannafelagshúsinum, Royndini.

- Ætlanini er at byggja einar 10 metrar uppí húsið eystureftir, og somuleiðis er ætlanin at nútímansgera felagshølini, soleiðis at tey nøkta tann tørv, sum neyðugur er við eitt nú umstøðum fyri brekað, brúsurúmum og øðrum fasilitetum.

Malan Hansen sigur, at kommunan hevur latið grundøkið til uppíbyggingina, og ætlanin er, at byggingin skal byrja, áðrenn langt um líður.

- Royndin eigur nakað av peningi, men neyðugt verður at taka upp lán, skal uppíbyggingin og umbyggingin fremjast undir einum, sigur hon.

Brian Hansen er formaður í ungmannafelagnum, Royndini, og Torbjørg Jacobsen er næstformaður.



*Í sambandi við innsavningartiltakið í Nólsoy í kvøld, siglir Norðlýsið til Nólsoyar kl. 21 og møguliga aftur kl. 23. Klokkan 04.30 sleppa fólk úr aftur Nólsoy við standfaraskipinum, Rytinu.*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*



# Ein útoyggjaskrivstova er altavgerandi

**- Fyri mær er eingin ivi um, at skulu munagóð úrslit náast, er neyðugt, at felagið hevur fíggjarliga orku, soleiðis at professionelt fólk kann manna eina útoyggjaskrivstovu. Her verður neyðugt at arbeiða fyri teimum mongu og góðu hugskotunum til menning, framburð og trivna á útoyggjunum, segði Óla Jákup úr Dímun á ársfundinum hjá Útoyggjafelagnum í Mikladali seinasta leygardag**

ÚTOYGGJAFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*



*Útoyggjafelagið varð formelt stovnað í Skúvoy í fjør. Seinasta leygardag helt felagið ársfund í Mikladali, og komandi ár verður ársfundurin í Hesti*
*Mynd: Guttormur Sørensen*

Útoyggjafelagið, sum seinasta leygardag helt ársfund í Mikladali, varð formelt stovnað í Skúvoy fyri einum ári síðan. Við hetta høvi, skipaðu skúvoyingar fyri megnar stevnutiltaki, sum var væl umtókt millum tey, sum vitjaðu í oynni hendan dagin.

Tiltakið í Kalsoynni, har næsti ársfundurin hjá Útoyggjafelagnum varð hildin seinasta leygardag, var eisini við stevnu, sum feløgini í oynni, skipaðu fyri.

Skráin byrjaði leygardagin kl. 9.00, tá ið fólk fingu morgundrekka á Syðradali. Kl. 10-10.30 sama morgun greiddi Asbjørn Lómaklett frá minnisvarðanum.

Útoyggjafelagið helt ársfund í Avhaldshúsinum í Mikladali frá kl. 11-13, og síðan var døgurði fyri teimum, sum knýtt eru at felagsvirkseminum.

Klokkan 14 setti Finnbogi Ísakson, útoyggjastevnuna á Trøllanesi, og síðan var felagssangur.

Eftir setanina, var konsert á Trøllanesi við Frændum og Brandi Enni.

Seinnapartin varð skipað fyri gongutúri norður á Kallin, eins og tiltøk vóru fyri børn.

Seinni um dagin og út á kvøldið vóru øll tiltøkini, ið eftir vóru, á Húsum.

Andras Joensen greiddi frá kirkjuni á Húsum, og eftir náttúrða var tombola, skjótibreyt og søla av smyrlubreyði í Bygdarhúsinum.

Klokkan 20 var eggjakast og togtogan, og um somu tíð høvdu fólk eisini høvið at vitja skúlan, har framsýning var av list og søla av ymiskum hondgjørdum lutum. Í Bakka-handlinum á Húsum var eisini framsýning av ymiskum gomlum og áhugaverdum lutum.

Ritan sigldi eykatúr í Kalsoynna kl. 23, og væl áðrenn hon kom út í oynna, var longu føroyskur dansur beint niðanfyri bygdarhúsið á Húsum.

Lagið var gott, og fólk hugnaðu sær. Nøkur fóru avstað aftur fyrr um kvøldið; onnur fóru til Klaksvíkar við Alfa Pilot hjá Tórleifi Sigurðssyni, og uppaftur nøkur fóru við Rytuni.

Men tað var ikki soleiðis, at allir gestirnir fóru heimaftur hetta kvøldið. Tað vóru eisini tey, sum eftir vóru og hugnaðu sær alla náttina saman við kalsoyingum.

## Útoyggjaskrivstova

Á ársfundinum hjá Útoyggjafelagnum, helt formaðurin, Óla Jákup úr Dímun, at kansoyingar høvdu lagt nógv fyri til tess at skipa fyri eini góðari stevnu.

- Stóra tøkk havi tit øll her á staðnum fyri hetta stóra tiltak, ið heilt vist hevur stóran týdning fyri samanhaldið oyggjana millum.

Formaðurin leit annars aftur um bak, nú fyrsta árið er liðið, síðan felagið formelt varð stovnað.

- Vit kunnu spyrja, um tey mál, sum rokkin eru, eru nøktandi. Sjálvur vildi eg fegin kunna víst á fleiri og størri úrslit av arbeiðinum hjá felagnum.

Hann vísti á, at sum tað allar fyrsta, setti felagið sær sum mál at stovna eina útoyggjaskrivstovu.

- Fyri mær er eingin ivi um, at skulu munagóð úrslit náast, er neyðugt, at felagið hevur fíggjarliga orku, soleiðis at professionelt fólk kann manna eina slíka skrivstovu. Her verður neyðugt at arbeiða fyri teimum mongu og góðu hugskotunum til menning, framburð og trivna á útoyggjunum.

Hann helt, at avvarðandi myndugleikar helst partvís skilja tørvin til ábøtur og nógvum økjum.

- Men skulu vit náa úrslitunum, krevjast stórar fyrireikingar, og somuleiðis er avgjørt neyðugt at finna røttu leiðirnar og mannagongdirnar.

Óla Jákup helt, at hesar uppgávur eru so mikið tíðarkrevjandi, at eingin kann vænta, at arbeiðið verður nóg munagott í longdini bara við sjálvbodnari arbeiðsmegi.

- Her haldi eg tað vera passandi at takka Olgu Biskopstø fyri tað arbeiði, hon hevur gjørt og framvegis ger.

Hann segði, at eftir at hava fundast nógv, havt samrøður og skrivað umsóknir til Oljumálaráðið, hevur felagið nú eina tilsøgn uppá 100.000 kr. í ár til rakstur av eini skrivstovu.

- Hetta gevur møguleikar til eitt hálvtíðarstarv tað, ið eftir er av hesum árinum, segði Óla Jákup.

Hann kunngjørdi á fundinum, at Olga er sinnað at átaka sær hesa .

Uppgávu, og viðmælti hann staðiliga, at hon verður sett í hetta starvið.

- Eg vil siga, at hetta kann vera ein byrjan. Vit mugu tó arbeiða av øllum alvi fyri, at felagið komandi fíggjarár kemur á løgtingsins fíggjarlóg við eini helst trífdaldaðari upphædd.

## Útoyggjar og SL

Óla Jákup í Dímun fegnaðist eisini um, at Strandfaraskip Landsins hevur víst viljan til at hoyra sjónarmiðini hjá Útoyggjafelagnum á samferðsluøkinum.

- Eftir at hava hoyrt okkara sjónarmið, vórðu stig tikin til at betra um tænastuna. Tó tykist, sum politiski myndugleikin ikki vil ella hættar sær at gera broytingar og skerja, har ferðasamband er fleiri ferðir dagliga - til fyrimuns fyri útoyggjarnar.

Formaðurin segði, at Vinnumálastýrið - sum svar uppá skriv hjá felagnum - júst hevur sagt, at vilji er til staðar at bøta um tænastustøðið við tyrluflúgvingini.

Kortini vil ráðið bíða, til nýggjur sáttmáli er gjørdur millum Atlantic Airwais og Strandfaraskip Landsins, væntandi einaferð til heystar.

- Vit hava í nevndini sett okkum fyri at koma eitt sit víðari við ætlanini um vinnuhúsini ella framleiðsluhúsini. Best hevði verið, um vit fingu gjørt eitt so at siga liðugt projekt, sum vit kundu lagt fyri myndugleikarnar, segði hann.

Av øðrum málum, sum felagið hevur arbeitt við, nevndi Óla Jákup úr Dímun, at felagið hevur fylgt við arbeiðinum hjá skúvoyingum og fólki í Fugloy at finna eina loysn í málinum um oljutunnurnar.

- Vit eru eisini á veg inn í málið við trupulleikanum á gsm-samskiftinum ymsastaðni í oyggjunum.

Óla Jákup segði, at felagið eisini hevur gjørt eina roynd at kunna seg um møguleikarnar fyri vinnuligum tiltøkum á útoyggjum.

- Vit vóru og tosaðu við Rasmussen & Weihe, men eru ikki komin víðari við hesum enn, segði hann.

Formaðurin segði, at felagið eisini arbeiðir við at fyrireika eina verkætlan um mentanarlig landsløg, sum tíðarritið, Glóðin, hevur skrivaðu um.

- Vit meta annars, at Glóðin livir upp til sítt navn. Hetta er eitt blað, sum kann halda lív í kjakinum um útoyggjarnar, og tað fegnast vit um, segði Óla Jákup úr Dímun, formaður í starvsnevndini í Útoyggjafelagnum.



*Børnini hugnaðu sær óført á útoyggjastevnuni í Kalsoynni, sum feløgini í Kalsoynni skipaðu fyri í sambandi við ársfundin hjá Útoyggjafelagnum*
*Mynd: Guttormur Sørensen*